Dagf. 29.10.2021
HMR J. nr. 21/21547-5

Kaj Leo Holm Johannesen
Landsstýrismaður í heilsumálum

Svar

uppá

Fyrispurning frá Rósu Samuelsen, løgtingskvinnu, nr. 52-061/2021 eftir § 52a í tingskipanini um rehabiliteringslóg og rehabiliteringsdepil

Fyrispurningurin er soljóðandi:
Spurningar:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta í verk eina yvirskipaða rehabiliteringslóg, sum fevnir um allar geirar innan rehabilitering?
2. Arbeiðir landsstýrismaðurin fram ímóti at seta á stovn ein rehabiliteringsdepil sum eina samskipaða tvørfakliga heildartænastu til kropsliga, sálarliga og sosiala viðgerð?
3. Um ja, nær og hvussu, og um nei, hvørjar eru grundgevingarnar?
4. Er samstarv millum Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið um nakrar framtíðarætlanir fyri rehabilitering?

Svar:

Til spurning 1

Í 2015 var lógarbroyting gjørd í sjúkrahúsverkslógini, har § 6a varð sett inn. Sambært hesi grein veitir Sjúkrahúsverkið ókeypis endurvenjing til sjúklingar, sum hava ein læknafakliga grundaðan tørv á endurvenjing. Kunngerð um endurvenjing innan sjúkrahúsverkið var sett í gildi í 2017, og verður endurvenjing allýst sum: miðvís, tíðaravmarkað og fyriskipað venjing, sum hevur til endamáls, at sjúklingurin í størst møguligan mun kann endurvinna sínar mistu førleikar, bæði likamliga, kognitivt og sálarliga. Sambært kunngerðini skal Sjúkrahúsverkið gera endurvenjingarætlan til sjúklingin, umframt veita sjúklinginum kontaktpersón, ið hevur ábyrgdina av at samskipa endurvenjingina hjá sjúklinginum innan Sjúkrahúsverkið og mótvegis Almannaverki og kommunum. Endurvenjingarætlanin verður latin avvarðandi kommunu, Almannaverkinum ella øðrum sjúkrahúsi, um endurvenjing skal halda áfram har. Líknandi ásetingar um endurvenjing eru í almannalóggávuni.

Lógarkarmar eru sostatt runt endurvenjingina. Landsstýrismaðurin metir ikki, at avbjóðingin við endurvenjingini í dag er, at ein yvirskipað rehabiliteringslóg vantar. Heldur er trupulleikin, at galdandi lógarásetingar ikki eru implementeraðar í praksis. Landsstýrismaðurin er tó sinnaður at taka ein fund við Landsstýriskvinnuna í almannamálum og Kommunufelagið fyri at umrøða møguleikar og tørv á einari

rehabiliteringslóg. Landsstýrismaðurin arbeiðir í løtuni við at implementera galdandi reglur viðvíkjandi endurvenjing innan Sjúkrahúsverkið. Fleiri eftirmetingarfundir hava verið um endurvenjingina, har Heilsumálaráðið og tey, ið arbeiða við endurvenjing á teimum trimum sjúkrahúsunum luttaka. Í hesum sambandi verður arbeitt við at dagføra vegleiðingina um tilboð um endurvenjing innan sjúkrahúsverk, almannaverk og kommunur. Eisini verður arbeitt við at skipa fyri undirvísing og verkstovum á teimum trimum sjúkrahúsunum um galdandi reglur um endurvenjing.

Til spurning 2 og 3

Landsstýrismaðurin arbeiðir áhaldandi við at menna endurvenjingina innan Sjúkrahúsverkið. Hetta verður gjørt við at fáa játtan til vega á fíggjarlógini til nýggj átøk innan endurvenjing. Játtanin til endurvenjingarøkið hækkaði við 2 mió. kr. í 2020 og við 1,6 mió. kr. afturat í 2021.

Landsstýrismaðurin ætlar at arbeiða fyri, at enn fleiri pengar verða settir av til endurvenjing í hesum samgongutíðarskeiðnum, og á fíggjarlógini 2022 eru 2 mió. kr. settar av afturat til endurvenjing. Harumframt verður arbeitt við at skapa tryggar karmar kring endurvenjingina innan Sjúkrahúsverkið, soleiðis at heilsustarvsfólk verður tilnevnt at samskipa endurvenjingartilboðið til sjúklingin, og soleiðis at sjúklingar, ið verða útskrivaðir av sjúkrahúsi, fáa eina endurvenjingarætlan.

Sjúkrahúsverkið arbeiðir sjálvt við at menna endurvenjingina. Samstarvað verður meira og meira uppá tvørs av teimum trimum sjúkrahúsunum, soleiðis at endurvenjing verður veitt og styrkt á øllum teimum trimum sjúkrahúsunum.

Landsstýrismaðurin metir, at hetta er rætta leiðin at fara og metir sostatt ikki, at tað er ráðiligt at skipa tann partin, sum Sjúkrahúsverkið veitir av tænastum innan rehabilitering í Føroyum, í einum depli.

Til spurning 4

Tað er eitt gott samstarv ímillum Heilsumálaráðið og Almannamálaráðið um endurvenjingina. Tær lógarbroytingar og kunngerðir, ið eru settar í gildi um endurvenjingina, eru gjørdar í tøttum samstarvi ímillum Heilsumálaráðið og Almannamálaráðið. Nevnast kann eisini, at ein samstarsavtala er gjørd ímillum Almannaverkið og Sjúkrahúsverkið á økinum. Landsstýrisfólkini á økinum hava í hesum valskeiðnum uppraðfest endurvenjingina munandi og hava, í tí sum er eftir av valskeiðnum, ætlanir um framhaldandi at uppraðfesta endurvenjingina.

Kaj Leo Holm Johannesen

landsstýrismaður